## Gunnar og Christian spældu javnleik

Gunnar Nielsen vardi málið hjá Blackburn allar 90 minutt-irnar, og Christian Mouritsen spældi við hjá Manchester City allan dystin, tá ið eykaliðini hjá teimum báðum kendu ensku feløgunum spældu dyst í fyrrakvøldið. Dysturin endaði við javnleiki 1-1. Blacbkurn legði seg á odda í fyrra hálvleiki, men Manchester City javnaði í seinna hálvleiki. Christian Restorff Mouritsen hevði eina góða roynd á málið hjá Black-burn, men landsmaðurin í málinum bjargaði royndini.



## Formulavenjarar í handilsskúla

Í summar var av fyrstan tíð í Føroyum farið undir eina ítróttarbreyt á miðnámskúla. Føroya Handilsskúli á Kambsdali bjóðaði ungum og evnaríkum fótbóltsleikarum at fáa ítróttin á tímatalvuna. Hetta hevur eydnast væl, og fyrireikingarnar til komandi skúlaár eru longu byrjaðar. Norðlýsið skrivar á heimasíðu sínari, at Eyðun Klakkstein úr KÍ - sum eisini hevur verið venjari í ár - saman við Sigfríði Clementsen úr EB/Streymi skulu venja skúladreingirnar eftir summarfrítíðina. Ítróttar-breytin verður eisini víðka soleiðis, at møguligt verður eisini at velja svimjing. Tað er staðfest, at Petur Heðin á Fløtti, fyrrverandi lands-liðsvenjari, skal standa fyri venjingunum.

# Gandakallurin úr Riga

**Fyri júst 48 árum síðani byrjaði ein dystur um heims-meistaraheitið í talvi, har Mikhail Tal skrivaði søgu við at gerast yngsti heims-meistari nakrantíð bert 23 ára gamal**

TALV
*Ólavur Simonsen*
*olavur@sosialurin.fo*

Mikhail Tal varð føddur í Riga, Letlandi í 1936. Tal lærdi at lesa longu sum 3 ára gamal og byrjaði skúlan í triðja flokki, tó at hann heldur vildi sleppa í fjórða flokk beinanvegin. Tal bleiv skjótt bitin av talvi og telvaði allastaðni, har hann kundi.

Stórsti parturin av lívi hansara var merktur av sjúku og vánaligari heilsu. Hann varð sera ofta lagdur undir skurð fyri vánalig nýrir. Hóast nógvar skurðviðgerð-ir, tosaði hann vanliga um talv, til hann sovnaði av doyvingini. Hann var eisini handtikin, meðan hann sat og telvaði á gøtuni, tí hann var rýmdur av sjúkrahúsi-num, har hann síðan varð tvingsilsinnlagdur.



*Tal var ein av fremstu álopstelvarum, ið nakrantíð hevur livað*

### Lummaroknarin

Tal telvaði einaferð ein simultan dyst í Zurich. Tal vísti á eina støðu, har mótstøðumaðurin hevði ein møguleika, sum mótstøðu-maðurin hevði yvirsæð. Tað førdi so víðari til eina vedding, har Tal veddaði, at hann kláraði at skriva øll 30 talvini niður frá byrjan til enda uttan at hyggja eftir borðinum aftur. Tá Tal hevði gjørt hetta, fekk hann sítt fyrsta eyknevni, sum var:"Lummaroknarin", tí hann vann veddingina.

### Gandakallurin

Tal var kendur undir nøvn-unum:Trøllmaðurin,Lumma-roknarin og Gandakallurin úr Riga. Hann kundi skapað tær mest ótrúligu kombina-tiónirnar úr mest óvæntaðu støðunum.

Atfinnarir søgdu ofta, at stílur hansara var ókorrektur ella skeivur, tí eftir at teir høvdu greinað støðurnar hjá honum yvir longri tíð, funnu teir leikir, sum góvu mótstøðumonnum hansara avgerandi fyrimun. Tal segði sjálvur, at hóast mót-støðumenninir funnu feilir fleiri mánaðar seinni, so telvaði hann rætt. Tað grundaði hann á, at tá teir ikki kundu finna skeivu leikirnar við talvborðið innan teir tveir tímarnar, sum teir høvdu at hugsa í, nyttaði tað lítið at koma aftur eftir so langa tíð og siga, hvørjir røttu leikirnir vóru. Tað var sera vanligt, at mótstøðumenninir komu í øgiliga tíðarneyð, tí teir ikki megnaðu at halda skil á teimum fløktu støðunum, ið Tal dróg teir út í, og sostatt taptu teir talvið. Tal fekk talv at líkjast einum listaverki av sálarligari krígsførslu.

### Heimsmeistari

Hóast heilsan ikki var ser-liga góð, vann Tal á Mikhail Botvinnik í 1960 bert 23 ára gamal, og soleiðis gjørd-ist hann yngsti heimsmeist-arin nakrantíð.

Tal varð mettur at vera størsta álopsflogvitið nakran-tíð. Hóast tøður hansara ofta kundu líkjast einum grót-broti, vóru støðumetingar hansara aloftast rættar.

Tal telvaði á hægsta stigi heilt til sínar seinastu dagar. Í 1992 vann hann eitt kviktalv móti sjálvum Kasparov, men varð síðan lagdur inn á sjúkrahús og doyði fáar dagar seinni.

Hann var ein av fáum, ið gjørdist stórmeistari, áðrenn hann gjørdist altjóða-meistari.

## Talvið hesa vikuna

**Tal - Velimirovic**
**USSR - Jugoslavia, 1979**

1.c4 c5 2.b3 Nc6 3.Bb2 e5 4.g3 d6 5.Bg2 Be6 6. Nc3 Qd7 7.Nf3 Bh3 8.Bxh3 Qxh3 9.Nd5 Qd7 10. e3 Nce7 11.Nc3 Nf6 12.0-0 e4 13.Ng5 d5 14.cxd5 Qf5 15.Nxf7 Kxf7 16.f3 Nexd5 17.fxe4 Nxc3 18.Bxc3 Qxe4 19.Qh5+ Ke6 [ 19...Kg8 20.Bxf6 gxf6 21.Rxf6 Qe7 22.Qd5+ Kg7 23.Qg5# Mát] 20.Qh3+ Kd6 21.b4 Kc7 22.Rac1 Rc8 23.Rf5 Qg4 [ 23...Kb8 24.Be5+ Ka8 25.Rxf6 Hvítur vinnur.] 24.Be5+ Kd7



25.Qf1 Qe4 26.Rc4 Qc6 27.Qh3 Qe6 [ 27...Kd8 28. bxc5 Hvítur vinnur.] 28.Bxf6 gxf6 [ 28...Qxc4 29. Bxg7 Hvítur vinnur.] 29.Re4 Qxa2 30.Rxc5+ 1-0

## A-lands-liðið fer til Challenge Trophy

**Nú er greitt, hvørji lið verða við í Challenge Trophy fyri kvinnur. OG HSF hevur gjørt av at senda sterkast møguliga kvinnulandsliðið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kappingin fer í ár fram á Cypros, og í mun til kappingina í Bosnia fyri tveimum árum síðani, verður talan um fleiri sterk lond, sum taka lut hesaferð. Í HSF vóru tey annars í iva, um Føroyar skuldu senda nakað lið avstað yvirhøvur, ella um talan møguliga skuldi verða um U-landslið. Hetta um talan enn eina ferð gjørdist um ov nógv veik mótstøðulið, har føroyska liðið einki fekk burtur úr ítróttarliga.

Nú er tó greitt, at so verður ikki. Gaman í eru øll londini ikki eins sterk, men nøkur eru, sum uttan iva kunnu vera við til at menna føroyska liðið í nøkrum knallhørðum dystum.

Bosnia, sum vann kappingina seinast, verður við, og tað verður Finnland eisini. Finnland var ikki við í 2006, men í 2004 spældi føroyska liðið eina óhugnaliga spenn-andi hálvfinalu móti Finnlandi.

Ísrael, sum Føroyar eisini spældu ímóti í 2004, verður eisini við í kappingini, har Cypros, Malta, Estland og Ongland/Skotland eisini taka lut.